## Breivik fær altjóða starv

Fráfarni venjarin hjá norsku hondbóltskvinnunum, Marit Breivik, er ikki arbeiðsleys, hóast hon hevur kvittað venjarastarvið. Hon er vald inn í fleiri nevndir, síðani hon legði frá sær, og nú ætla norðmenn at fáa hana í nevndina í altjóða hondbóltssambandinum, IHF. – Har kann eg virka fyri, at hondbólturin verður ein heimsítróttur og ikki ein europeiskur ítróttur burturav, sum tað er nú, sigur Marit Breivik.



## Ronaldo og Bolt venja saman

Cristiano Ronaldo fær nú fáa hjálp frá heimsins skjótasta manni, Usain Bolt, tí í summar er ætlanin, at teir báðir skulu hittast. Tá skal OL-kongurin læra Manchester United-stjørnuna at gerast skjótari. Sjálvur er rennarin av Jamaica sera íðin fótbóltsfjeppari, og fyrr hevur hann vant við ongum mætari enn Real Madrid. So kanska hann eisini kann læra okkurt av Ronaldo, sum dugir mangt og hvat við einum bólti.

# Teir ungu yvirhála teir royndu

**– Eg havi stórt álit á teimum ungu spælarunum. Hetta eru spælarar, sum hava yvirhálað teir etableraðu innanfyri, sigur Heðin Askham um tað unga og óroynda landsliðið, hann hevur tikið út til dystin ímóti Íslandi.**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Heðin Askham hevur millum aðrar tikið út Odmar Færø, Gudmund Nielsen, Kristoffur Jakobsen, Christian R. Mouritsen og Gunnar Nielsen, sum kunnu spæla sín fyrsta A-landsdyst í Íslandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað eru ikki royndirnar, sum eyðkenna fyrstu landsliðsúttøkuna hjá Heðini Askham sum A-landsliðsvenjara í Føroyum.

Fróði Benjaminsen, Súni Olsen og Símun Samuelsen eru etableraðir og royndir spælarar, men umframt teir hevur eingin av teimum úttiknu til dystin ímóti Íslandi spælt 10 landsdystir. Fimm av spælarunum hava ongantíð spælt á A-landsliðnum enn, og 13 av teimum 18 hava spælt fimm landsdystir ella færri.

Men hóast vantandi royndirnar á A-landsliðsstigi, hevur Heðin Askham fult álit á teimum spælarunum, sum hann hevur tikið út til dystin ímóti Íslandi 22. mars.

– Vit hava royndar spælarar í øllum ketum, og so kunnu vit byggja út við ungum og góðum spælarum, sum hava markerað seg í føroysku kappingini, sigur Heðin Askham.

### Teir ungu yvirhála

Heðin Askham hevur seinnu árini vant U21-landsliðið, og fleiri av spælarunum, sum hava staðið seg væl á tí landsliðnum, eru nú við í A-landsliðshópinum.

– Eg havi stórt álit á teimum ungu spælarunum. Hetta eru spælarar, sum hava yvirhálað teir etableraðu innanfyri, sigur Heðin Askham

Royndir spælarar sum Jákup á Borg og Andrew av Fløtum eru ikki tiknir út. Eru teir vrakaðir á landsliðnum?

– Eg havi úttikið eitt landslið. Eg havi ikki vrakað eitt landslið. Eg gjørdi upp við meg sjálvan, tá ið eg tók hesa uppgávuna á meg, at eg skuldi til Íslands við einum landsliði, sum eg kundi standa hundrað prosent inni fyri.

– Og eg havi verið úti við so at siga øllum av hesum spælarunum fyrr, og teir hava prógvað, hvat teir duga. Eingin hevur spælt seg av liðnum, men eg havi bara úttikið eitt lið, sum eg kann standa inn fyri.

Stúrir tú ikki, at tær manglandi royndirnar kunnu fara at kosta í Íslandi?

– Nei, tað rokni eg ikki. Hetta eru alt spælarar, sum hava verið ígjøgnum mylluna við U21-landsliðnum, og sum eru vanir at verða í dystum, sum í minsta lagi svara til mótstøðuna, sum teir fara at fáa í Íslandi. Teir hava roynt seg ímóti Italia og Kroata og øðrum sterkum londum í U21-høpi.

## Hópurin til Íslandsdystin

| | Felag | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|
| Fróði Benjaminsen | HB | 50 | 2 |
| Súni Olsen | Víkingur | 32 | 2 |
| Símun Samuelsen | Keflavík | 21 | 1 |
| Jóhan Troest Davidsen | NSÍ | 9 | 0 |
| Pauli G. Hansen | EB/Streymur | 6 | 0 |
| Bogi Løkin | NSÍ | 5 | 1 |
| Arnbjørn Hansen | EB/Streymur | 5 | 0 |
| Egil á Bø | EB/Streymur | 5 | 0 |
| Einar Hansen | NSÍ | 5 | 0 |
| Jónas Þór Næs | NSÍ | 5 | 0 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 2 | 0 |
| Kristoffur Jakobsen | KÍ | 1 | 0 |
| René Tórgarð | EB/Streymur | 1 | -4 |
| Christian R. Mouritsen | HB | 0 | 0 |
| Gudmund Nielsen | EB/Streymur | 0 | 0 |
| Gunnar Nielsen | Manchester City | 0 | 0 |
| Levi Hanssen | EB/Streymur | 0 | 0 |
| Odmar Færø | Brøndby IF | 0 | 0 |

# Bara venjari henda eina dystin

**Formaðurin í landsliðsnevndini, Magnus á Stongum, slær fast, at Heðin Askham bert er settur til henda eina dystin og at framvegis verður leitað eftir nýggjum A-landsliðsvenjara.**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nú eitt ættarliðsskifti hómast í úttøkuni av fótbóltslandsliðnum til Íslandsdystin 22. mars, eru fleiri farin at gita, at Heðin Askham ikki bara er settur sum venjari henda eina dystin, men restina av hesum árinum.

Í 3-2 kundi tað eisini ljóða, sum tann nú fyrrverandi landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, hevði fingið ta fatan, at talan var um meira enn bara henda eina dystin.

Men formaðurin í landsliðsnevndini hjá Fótbóltssambandinum, Magnus á Stongum, slær nú fast, at venjarin bara er settur fyri henda eina dystin:

– Eg kann mana allar gitingar um nakað annað í jørðina, og tað hevur eisini alment verið frammi, at Heðin Askham er settur sum høvuðsvenjari til henda dystin. Meira er ikki í tí, og vit leita framvegis eftir einum nýggjum A-landsliðsvenjara, sigur hann.

### Upp á sín máta

Viðvíkjandi úttøkuni av føroyska landsliðshópinum til dystin í Kórinn-høllini í Kópavogi sigur Magnus á Stongum, at tað er nakað, venjarin einsamallur hevur ábyrgd av og tekur støðu til:

– Tað ger hann við fullari ábyrgd, uttan at tað upp á nakran máta er upp til okkum at blanda okkum upp í tað. Vit hava sett venjaran, og okkara uppgáva er í øllum førum ikki at taka støðu til nakað, fyrr enn í fyrsta lagi, til dysturin er spældur, sigur landsliðsnevndarformaðurin.

– Somuleiðis virða vit, at Heðin Askham, nú hann hevur kjansin til tað, ger hetta upp á sín máta og tekur tað liðið út, sum hann heldur vera best ført fyri at fáa eitt gott úrslit yviri í Íslandi.



*– Vit leggja okkum ikki útí, hvussu venjarin tekur landsliðið út, sigur formaðurin í landsliðsnevndini, Magnus á Stongum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*